


# Fer at halda fram Kristina slepti



*- Eg eri skúlafólk og havi gingið í føroyska skúlanum frá tí lítla bygdarskúlanum í Haraldssundi til lærdum háskúla. Eg havi eisini sitið í ymsum nevndum undir mentamálaráðnum, sum hava við skúlaskap at gera, sigur Óluva Klettskarð, komandi landsstýriskvinna í mentamálum*

**- Eg haldi, at eg skyldi føroyingum at halda fram við teimum stóru tiltøkum, sum undankvinna mín setti á skinnarar, sigur nýggja landsstýriskvinnan í mentamálum**

LANDSSTÝRISKVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*

- Eg havi altíð havt sera stóran áhuga fyri mentan í breiðastu merking og eg haldi eisini, at eg havi okkurt at bjóða.

Tað sigur nýggja landsstýriskvinnan í mentamálum, Óluva Klettskarð

Men hon sigur, at í fyrstu syftu hevur hon gjørt upp við seg sjálva, at hon ætlar at halda fram, har undankvinna hennara, Kristina Háfoss, slepti og at føra hennara verk víðari.

- Eg haldi at vit skylda Føroya Fólki, at tað er ein ávísur samanhangur í arbeiðnum í mentamálaráðnum og tí fari eg at halda fram við teimum stóru tiltøkum, sum Kristina Háfoss hevur lagt lunnar undir.

Í hesum sambandi nevnir hon skúladepilin, sum skal byggjast í Marknagili.

- Tað er ein av teimum heilt stóru verkætlanunum, sum tað hevur týdning at fullføra, sigur Óluva Klettskarð.

Annars heldur hon, at tað er nakað tíðliga hjá henni at gera eina greiða niðurstøðu um nøkur ávís mál, sum hon ætlar sær at fremja.

- Eg fari í fyrstu syftu at seta meg væl inn í tey mál og tey tiltøk, sum eru ígongd, áðrenn eg seti mær nøkur ávís mál, sigur hon.

## Gransking er eitt hjartabarn

Óluva Klettskarð staðfestir, at hon hevur altíð stóran áhuga fyri mentamálum í

# Føroya Tele eigur óruddið



*Í sambandi við greina- og myndaróðina »Heimsins reinasta oyggjaland« har vit vóru í Vágum fríggjadagin, var hendan myndin nýtt sum høvuðsmynd. Stjórin í FK, Finn Nielsen, hevur gjørt okkum vart við, at tað ikki er Føroya Keypsamtøka, sum eigur hetta óruddið í Miðvági, men harafturímóti Føroya Tele, ið liggur beint við síðuna av. Vit biðja lesararar okkara halda okkum til góða...*



*….. helst átti tað av verið hendan myndin - í staðin fyri ta við síðuna av - sum skuldi verið høvuðsmynd í myndaróðini »Heimsins reinasta oyggjaland« í vikuskiftisblaðnum, ið kom á gøtuna fríggjadagin*